


*Nú eru tvær familjur í oynni og nógv børn undir skúlaaldur. Tyrlan er júst komin og tey heilsast*
Mynd: Álvur Haraldsen

# – Vit ERU her

**Lívið og bóndalívið á Stóru Dímun er als ikki ókent fyri tey bæði**

Bæði Jóhan Petur og Linda hava verið í Stóru Dímun fleiri ferðir áður, tí Linda sjálv er í familju við bóndahjúnini í oynni.

Eftir at Jógvan Jón trúliga hevði heitt á tey um at koma út, hugsaðu tey um tað eina tíð. Stutt undan jólum í fjør tóku tey so endaligu avgerðina.

Tað er helst so sum Linda sigur:

- Slík tilboð og slíkar avbjóðingar er ikki nakað sum ein fær gjøgnum dyrnar hvønn dag. Vit kundu ikki annað enn siga ja.

- Vit máttu simpelthen bara royna tað. Gjørdu vit tað ikki nú, eri eg heilt vís í at vit høvdu angrað tað restina av lívinum!

## Veddaðu

Tey høvdu upprunaliga hugsað um at royna okkurt heilt annað, onkra heilt aðrastaðni í eina tíð. Einasta treytin, tey sjálvi settu sær var at hetta skuldi vera mennandi, og at tey sluppu at prøva seg av, undir heilt øðrum umstøðum enn teimum kendu á Argjum.

Tað er júst hetta, sum tey longu nú hava upplivað, hóast tey bert hava verið her í góðar tríggjar vikur. Hetta er kanska eitt sindur í mótstríð við tað, sum summi fólk annars hildu um avgerðina.

- Tja, tað var onkur, sum skemtandi helt fyri, at hann ætlaði at vedda við okkum um, hvussu leingi vit hildu út at verða her.

- Vit ætla so okkum at verða her fram til 1. mars næsta ár. Tað gleða vit okkum til, sigur Linda.

## Vit ERU her

At koma higar í oynna hevur verið ein stór broyting fyri hjúnini. Frammanundan skuldi nógv praktiskt fáast frá hond, millum annað at fáa orlov frá arbeiðsplássunum, útleiga av húsum á Argjum og annað í tí sambandi.

Hesi viðurskiftini lagaðu seg til tað besta fyri familjuna, og fyrst í hesum mánaðinum settu tey fótin á Dímunar-jørð – hesaferð ikki sum gestir, men sum húskallur við familju.

Eftir tríggjar vikur eru tey av sonnum vorðin akklimatiserað, tí sum Linda so rámandi tekur til:

– Vit hugsa als ikki um arbeiðsdagin í Havn longur. Vit ERU veruliga komin herút!

## Friður

Alt gott um heimstaðið og lívið har, men her á Stóru Dímun merkja tey – og eiga tey – tann friðin, sum bert fæst á eini slíkari útoyggj.

Frammanundan var eitt øgiligt jag við øllum tí, sum hoyrir til eitt vanligt heim í høvuðsstaðnum, við hópin av føðingardøgum, bindiklubbum, frítíðarvirksemi og 1000 øðrum lutum, ið ein mátti taka støðu til hvønn einasta dag.

- Men nú. Nú duga vit at síggja, hvussu nógv allir hesir aktivitetirnir fyltu í lívi okkara. Vit settu ikki spurning við tað. Vit vóru bara við.

- Nú er friður yvir okkum og vit eru púra avstressað – og tað er alt hent uppá bert tríggjar vikur. Ja, hetta er vanvittiga super skal eg siga tær, slær Linda fast.

## – Nær sleppa vit í skógvar?

Hinvegin so hevur ikki verið nógvar møguleikar fyri veruligum útilívi henda fyrsta mánaðin. Tríggjar tær fyrstu vikurnar var í roynd og veru eingin veruligur turrur dagur.

Hetta vóru tey fyrireikað uppá, og høvdu vit sær góð og heit klæðir og gummistivlar.

Men børnini troyttast kortini av at ganga í hesum vetrarklæðunum alla tíðina. Tann eina dótturin spurdi tí mammu sína henda eina dagin:

- Mamma, nær sleppa vit aftur í skógvar?!

> *Slík tilboð og slíkar avbjóðingar er ikki nakað sum ein fær gjøgnum dyrnar hvønn dag. Vit kundu ikki annað enn siga ja. Vit máttu simpelthen bara royna tað. Gjørdu vit tað ikki nú, eri eg heilt vís í at vit høvdu angrað tað restina av lívinum!*





